

## 600 stakir uppihaldarar fáa barnaískoyti

Almanna- og heilsumálaráðið boðar nú frá, at um mánaðarskiftið fáa knapt 600 stakir uppihaldarar fyri fyrstu ferð eitt serligt barnaískoyti. Barnaískoytið er 6000 krónur árliga fyri hvørt barnið, og verður útgoldið hvønn ársfjórðing. - Tað eru umleið 1000 børn, sum fara at merkja, at mamma ella pápi teirra fáa henda styrk. Vit hoyra javnan um stakar uppihaldarar, ið hava tað torført at fáa endarnar at røkka saman fíggjarliga, og við hesum ískoytinum verður gerandisdagurin eitt sindur lættari hjá hesum bólki, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum í stuttari viðmerking. Samlaði kostnaðurin árliga fyri landskassan er, út frá hesum tølum, umleið 6 milliónir krónur árliga.

*Tilvildarlig mynd*

# Fara í Stakkin leygardagin

**Eins og tey nógvu undanfarnu árini fara tjørnuvíkingar á fjall í Tjørnuvíksstakki. Hetta verður nú leygardagin. Í sambandi við hetta, verður aftur í ár hópurin av tiltøkum kring fjallgonguna, og fólk hava møguleika at koma við**

SEYÐUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Aftur í ár verður farið í Stakkin eftir seyði. Í ár eru tað 13 seyðir at taka, fimm ær og átta lomb. Sum vanligt er, verða øll hesi seld á uppboðssølu seinni, tá komið verður aftur til Tjørnuvíkar. Í ár verður eisini nakað av grýtuklárum lundum at keypa á hesi vanliga forvitnisligu uppboðssøluni.

Í ár verða fýra lomb flett og seld í stykkjum, meðan restin verður selt á lívi. Tó verður møguleiki at fáa seyðin flettan, um tann hepni keyparin ynskir hetta.

### Ein langur dagur

Farið verður í stakkin leygardagin 20. september, og tíðliga verður farið avstað. Dagurin byrjar longu klokkan 7.30 við at fólkið, sum ætlar sær við út í Stakkin møtist niðri á grund. Og í samband við Staksdagin verður tann gamli siðurin eisini brúktur, at sungið verður, áðrenn farið verður til gongu.

Vanliga tekur tað ikki langa tíð at reka, og fyrireikararnir vænta, at umleið á middegi er fjallfólkið aftur í bygdarhúsinum, har Stakksnevndin bjóðar til døgverða.

Uppboðssølan byrjar klokkan 17.00, og vanliga er hetta eitt sera hugnaligt og spennandi tiltak. Serliga er spenanndi at vita, hvør kemur at gera tað størsta kvettið.

Eftir uppboðssøluna verður seyðurin flettur, sum varð seldur á lívi, og tá verður vanliga dúliga gingið inn í kjallararnar.

Kvøldið endar eisini sum undanfarin ár, nevnliga við at tað verður tann vælumtókti stakksdansurin í bygdarhúsinum.a

Fyri tey, sum verða við frá byrjan til enda, verður talan sostatt um ein langan, men áhugaverdan og spennandi dag.



*Leygardagin verður farið í Stakkin eftir seyði og í ár verða fimm ær og átta lomb tikin*
*Mynd: Sjúrður V. Nielsen*

# »Ein regla um dagin má vera nokk!« fær gott ummæli

**Filmurin hjá Katrini Ottarsdóttir, »Ein regla um dagin má vera nokk!«, sum snýr seg um Tórodd Poulsen, fær gott um mæli í danska blaðnum Berlingske Tidende**

FILMAR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




*»Ein regla um dagin má vera nokk!« fær fýra av seks stjørnum frá Ebbe Iversen, filmsummælara*
*Mynd: úr filminum*

Í gjárkvøldi, 17. september, hevði dokumentarfilmurin hjá Katrini Ottarsdóttir, »Ein regla um dagin má vera nokk!«, sum snýr seg um listamannin Tórodd Poulsen, frumsýning á Bryggjuni í Keypmannahavn. Tóroddur Poulsen og Katrin Ottarsdóttir vóru bæði til staðar á frumsýningini, og eftir sýningina bjóðaði Føroyska Sendistovan ymiskt at sløkkja tostan við.

Í gjár hevði danski filmsummælarin hjá Berlingske Tidende eitt stutt, men gott ummæli av filminum. Niðanfyri stendur filmsummælið føroyskað.

### Ein klókur og latur yrkjari

Tann føroyski yrkjarin, Tóroddur Poulsen, er føddur í 1957, býr í Keypmannahavn og skrivar sínar ógvusligu yrkingar á eini gamaldags skrivimaskinu.

Í tí intima portrettfilminum »Ein regla um dagin má vera nokk!« verður hann lýstur við árvaknum áhuga av landsmanninum Katri Ottarsdóttir – kend fyri leikfilmar so sum »Atlantic Rhapsody« og »Bye Bye Bluebird« - og framkemur sum ein fámæltur og hugtungur maður, sum er knarrutur á ein rættiliga góðsligan hátt og sum hevur ein margháttligan form fyri snubbut hýri. Hann er harafturat eisini bæði tónleikari og málari (hansara málningar eru fyltir við súkklum!), og hann framførir lívsvísdóm av slagnum »onkuntíð skal mann bara sita og stara« og trýr harafturat ikki uppá føroyskt sjálvstýri, tí »føroyingar eru for tungir í dintlinum«. Tað er hann fyri sovítt eisini sjálvur, men yrkingarnar hjá honum eru hvassar og harðar, og mann kemur til at dáma hann gjøgnum henda djúbt konsentreraða, visuelt krystallklára og sniðfundiga stuttliga filmin.

Hetta var filmsummælið hjá danska Ebbe Iversen, sum gav filminum fýra av seks stjørnum, og sum er at lesa á heimasíðuni hjá Berlingske Tidende.

### Føroysk frumsýning

Aftur í kvøld verður filmurin vístur á Bryggjuni í Keypmannahavn klokkan 20.00, og Tóroddur Poulsen og Katrin Ottarsdóttir verða til staðar undir sýningini.

Um góðan mánað fáa føroyingar so møguleika at síggja henda forvitnisliga filmin um listamannin Tórodd Poulsen. Tann 17. oktober verður hann frumsýndur í Norðurlandahúsinum í samband við at tað verður Norðurlendsk Filmsvika har. Nærri verður at frætta um hesa sýningina seinni.

Brot av filminum kunnu longu nú síggjast á heimasíðuni hjá Blue Bird felagnum, www.bluebirdfilm.dk/filmclips.html.